# Bilar

Nr. 175 • hósdagur • 15. september 2005 • 79. árg.

# Toyota í Frankfurt




*Millum nýggjheitirnar í Frankfurt verður nýggi Toyota Yaris, sum kemur á evropeiska marknaðin fyrst í 2006*



*Konseptbilurin Toyota Endo er designaður á evropeiska designsentrinum hjá Toyota í Fraklandi*



**Altjóða bilaframsýningin í Frankfurt, ið er ein av heimsins størstu, verður opin fyri almenninginum frá 15. til 25. september, har nógvar bilnýggjheitir verða at síggja m.a. nýggi Toyota Yaris**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Millum nýggjheitirnar í Frankfurt verður nýggi Toyota Yaris, sum er vorðin nakað størri enn forgangarin. Designið er nýtt, men nýggi Yaris líkist forgangaranum, sum hevur verið ein succes hjá Toyota. Bilurin kemur á evropeiska marknaðin fyrst í 2006.

Ein annar Toyota, sum verður sýndur fram í Frankfurt, er Toyota Endo, sum er ein konseptbilur, ið er designaður á evropeiska designsentrinum hjá Toyota í Fraklandi. Bilurin hevur sitipláss til trý vaksin fólk.

# Kolumbiskir kúfangarar



*Hvat ger man við eina kúgv ið hevur skuldina av einum ferðsluóhappi. Í Kolumbia verða tær handtiknar*

**Ein kolumbisk kúgv varð herfyri handtikin, tí hon hevði skuldina av einum ferðslóhappi í býnum Giron í Kolumbia**

Kúgvin gekk og mól á vegnum í kolumbianska býnum Giron, tá ein kvinna á motorsúkklu koyrdi á hana. Til alla lukku fingu hvørki kúgvin ella kvinnan á motorsúkkluni stóran skaða, men kúgvin var til so stóran vanda fyri onnur í ferðsluni, at løgreglan var noydd at fáa hana av vegnum.

Tá politistarnir ikki funnu fram til eigaran av kúnni, tóku teir hava við á politistøðina.

Um eitt fólk hevði verið skyld í einum slíkum ferðsluóhappi, so vóru hann ella hon sett aftan fyri rimarnar, so hví ikki gera tað sama við eina kúgv, sigur ein talsmaður hjá løgregluni í Giron.

*ekstrabladet.dk*